# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# JØRGEN MISSIR KVØRKRATAKIÐ



Loksins tykist tolið uppi í samgonguni. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin vilja ikki bakka fyri Fólkaflokkinum, og Jørgen Niclasen vil hava løgmann at útskriva nýval. Sostatt tykist Fólkaflokkurin at hava mist kvørkratakið á hinum samgonguflokkunum, nú løgmaður hevur sett honum stólin fyri hurðina.

Tað er eyðsæð, at løgmaður ikki longur vil hava sitandi á sær, at samgongan er ein parodi. Hann heldur ikki, at tað við nýggju játtanarskipanini í huga er optimalt, at ein flokkur ger sær til kotymu, at hann ikki skal vera við í semjuni um figgjarkarmin.

Og sjálvandi ber tað ikki til. Hetta átti løgmaður at havt gjørt púra greitt fyri langari tíð síðani. Men at einasta loysn á slíkari kreppu er nýval – fyri at reinsa luftina, sum Jørgen Niclasen tók til, tað er at loypa uppum, har garðurin er lægstur.

Hetta minnir kanska eitt sindur um støðuna í 1996, tá Javnaðarflokkurin tók seg úr samgonguni hjá Edmundi Joensen – sannførdur um, at Edmund Joensen fór at skriva út nýval. Men tað gjørdi løgmaður ikki. Hann sendi boð eftir Fólkaflokkinum, og so varð nýggj samgonga skipað. Síðani hevur Fólkaflokkurin havt valdið í landsstýrinum - og havt fastatøkur ávikavist á Tjóðveldisflokkinum, Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum. Tí er tað politikkurin hjá Fólkaflokkinum í eitt nú fiskivinnumálum, sum verður førdur.

Kaj Leo Johannesen vísti í Degi og Viku í gjárkvøldið á, at tað er ein møguleiki, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin samstarva víðari í eini minnilutasamgongu. Hann nevndi fleiri stórmál, sum vilji er í løgtinginum at fáa ígjøgnum, eitt nú nýggjan kommunubygnað, tilfeingisskatt og fleiri stórar íløgur.

Tað hevði verið sera áhugavert at sæð konstruktivt politiskt arbeiði í løgtinginum, har Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin kundu samstarvað við ymsar flokkar um tey stóru málini. Sum gongdin er vorðin seinastu árini, so halda tingfólk tað vera stuttligari at spyrja landsstýrisfólk ymsar – mangan tápuligar – spurningar, sum landsumsitingin má brúka nógva arbeiðsorku at finna fram – ofta til onga nytta ella bert til at stinga onkrum skør.

Uttan iva eru fleiri av málum, sum liggja í tinginum, ið eitt nú Tjóðveldi kann fremja saman við Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum. So er spurningurin bara, um valfepurin er ov høgur til at reka konstruktivan politikk.

Men løgmaður eigur at gera sær greitt, at ein stjórnarkreppa ikki treytaleyst nýtist at føra til nýval. Men hon kann føra til annað samstarv, sum kann fara at vísa seg nógv gagnligari.

**» Kreppan eitt gylt høvi at royna eina minnilutastjórn**

# Má ikki fáa fótin fyri seg



Tað er helst av taktiskum ávum, at Fólkaflokkurin so fegin vil hava løgtingsval í ótíð. Eins og Javnaðarflokkurin, so stendur Fólkaflokkurin seg illa í veljarakanningum, men tað sum nógv verri er, er at Poul Michelsen hevur vent flokkinum bakið og hevur stovnað nýggjan flokk, Framsókn.

At Fólkaflokkurin vil framprovokera eitt val nú er sjálvandi fyri at Poul Michelsen og hansara flokkur ikki skal fáa fótin fyri seg. Fólkaflokkurin er organisatoriskt í sera trongum skóm, og væntast kann, at Framsókn kann taka nógvar veljarar frá flokkinum.

Men eydnast tað Jørgeni at fáa val nú, so fær Poul Michelsen ein trupulleika – men tað kann eins væl gerast ein boomerangur fyri Fólkaflokkin av eini aðrari verð...

# Neyvan val á páskum

Ger løgmaður av at skriva út val í dag, so kann valið vera um tríggjar vikur. Men tá er langi fríggjadagur, og tá ber ikki til at hava val. Næsti møguleiki er leygardagin 23. arpíl, tá er páskaaftan, og tað er neyvan ein hugsandi valdagur.



Soleiðis kunnu vit ikki rokna við, at tað fer at eydnast løgmanni at skriva út val við stytst møguligu freist. Fyrr var freistin seks vikur, men hon er stytt niður í tríggjar viku. Tað sama er galdandi, tá Fólkatingsval er. Og fólkatingsval er sum oftast í ótíð, og tað verður altíð gjørt við stytst møguligu freist.

Men tað er als ikki víst, at okkum nýtist at hugsa um val. Um samgongan nú verður lappað samanaftur, so heldur parodiin helst fram – og tað er valla hugsandi, tá løgmaður hevur valt at seta Fólkaflokkinum stólin fyri hurðina, og tá Aksel Johannesen hevur valt at tosa við stórum stavum.

Kanska vit fara at uppliva okkara fyrstu minnilutastjórn – men tað krevur nógv av andstøðuni. Tað krevur, at tingfólkini hjá Tjóðveldi hugsa pragmatiskt, og tað kann vera ringt so stutt undan vali.

Argumentini fyri at fáa eina sitandi stjórn frá viga altíð tyngri enn skilvísur semjusøkjandi politikkur, tíverri – í hesum føri fyri Tjóðveldi. Men støðan hevði valla verið øðrvísi, um samgongan varð skipað við øðrum flokkum.



**» Her skal meira veiggj í!**

HEÐIN MORTENSEN
KJAK Á SÍÐU 32



**» Jan Müller seksti**

NØVN Á SÍÐU 17-19

# Paul McCartney kemur til Føroyar

Kenda Beatles-legendan, Paul McCartney kemur nú til Føroya at mótæla grindadrápi.

Paul McCartney, sum er vegetarur og djóravinur, kemur til Føroya við privatflogfari, hósdagin 7. juli. Hann er opin fyri at hava eina konsert, men við hørðum treytum.

Tað er tíðindastovan WAP, sum veit at siga, at Beatles-legendan kemur til Føroya fyri at stuðla teimum mongu fólkunum, sum longu tá eru komin til landið at mótmæla grindadrápi.

Paul McCartney ætlar at steðga nakrar dagar, og koma á tal við "The local leader of the faroese government", sum hann málber seg við WAP. Kaj Leo Johannesen, løgmaður vil vanliga ikki fara á fund við grindamótmælisfólk, men Paul McCartney veit, at tónlistin hjá honum eigur nógvar fjepparar í Føroyum, og hann vónar tí, at løgmaður fer at gera eitt undantak, so hann sleppur á fund, har hann hvassliga fer at mótmæla "The mass-murder of pilotwhales", sum tikið verður til.

Paul McCartney vil ikki útihýsa, at hann fer at hava eina konsert, meðan hann er í Føroyum. Men tað verður undir treytum, sum meirilutin av føroyingum neyvan kann ganga við til.

Við WAP sigur Paul McCartney:

– Um føroysku leiðarnir lova mær, at teir gevast at drepa grind, so skal eg geva eina ókeypis konsert í tí størsta býnum í Føroyum. Ganga teir ikki við til tað, ja so verður bara eingin konsert. Paul McCartney er tó til reiðar at koma í tal við vanliga føroyingin, og hann skrivar gjarna autografar, og hann signerar gjarna gamlar Beatles-plátur teir dagarnar hann er staddur í Føroyum.



**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*